# EYSTUROYAR DANSIFELAG

Tann 10.september 2023

## Skráin fyri veturin 2023-2024

Vit halda til í Hæddini, Heiðavegi 19, Saltangará, vanliga fríggjakvøld kl. 21 til út ímóti midnátt.

Her er kvæðaskráin fyri komandi vetur – tað, sum nevndin hugsar sær, verður kvøðið sum minimum. Tað nógva er vælkent, meðan okkurt er ókent ella minni kent. Aftrat hesum verðu kvøðið nógv vælkent og eisini lætt. Øll eru vælkomin at skipa. Alt á skránni er at finna í kvæðabók okkara á netinum: **eystdans.dk**

Vit hava loyvt okkum at seta vertir, ofta uttan at spyrja; men ber tað ikki til at vera vertur, kunnu tit vinarliga siga nevndini frá – ella gera avtalu um at býta um við onkran.

| | | |
|---|---|---|
| 20/10.2023 | Hin føroyski dansurin, Ivan.<br>Harra Pætur og Elinborg, Jón Rói. | Vertir: Nevndin |
| 27/10 | Harpuríma, Anna og Sanna.<br>Rudisarvísa, Kári Sverrisson. | Vertir: Anna Maria og Tóta |
| 03/11 | **Brúðardansur**<br>**Kl. 21.** Bøhmerlands dronningen, Jóna; Fisken, Jóannes; Várharra hann segði, Jón Rói.<br>Kaffisteðgur. Meinhard Bjartalíð, sóknarprestur, hugleiðir. Harra Pætur og Elinborg, Jón Roi;<br>Kong Hans, Kristian; Leivur Øssursson, Ivan. | Vertir: Erla og Jónhild |
| 10/11 | Dronning Dagmars døð, 1.-21 ørindi, Kristian.<br>Kong Sverke, Høgni. | Vertir: Adelaid og Liljan |
| 17/11 | **Táttakvøld**. Vit kvøða stutt og lætt. Nógv ymisk skipa. Meir um tað seinni. | Vertir: Aslaug og Johild |
| 24/11 | Stærke Tidrik, Leivur.<br>Frísarnir í Akrabergi, Jóannes. | Vertir: Sunneva og Elsa |
| 01/12 | **Í Funningi**, dansistovuni, uppi í bygdini.<br>Spanialand og Myklegaard, Hans og Ivan.<br>Vaagen, Anfinnur. | Vertir: Jytta og Johan |
| 08/12 | **Á Strondum,** í Pensionistahúsinum, Heygsstøð 3.<br>Bøhmerlands dronningen, Jóna.<br>Strandatáttur, Joen Carl.<br>Vind op, vind op i rå, Elin. | Vertir: Marita, Jóna og tær á Strondum |

| | | |
|---|---|---|
| 05/01-24 | Der går dans på Ribergade, Leivur.<br>Engang det sig nu hændte, Jón Rói | <br>Vertir: Margretha og Anna J. |
| 12/01 | **Í Glyvr'Hanusarhúsi, Norðragøtu**<br>Torkilsdøtur, Hanna.<br>Tjúgundi biðil, Anfinnur. | <br><br>Vertir: Sanna, Anna og tær í Gøtu. |
| 19/01 | **Blíðskaparkvøld**<br>Dansifelagið í Havn er boðið.<br>Dvørgamoy I, Louis. | <br><br>Vertir: Nevndin |
| 26/01 | **Aðalfundur**, skrá eftir lógini.<br>Dronning Dagmars død, frá 22. ørindi og rest. | <br>Vertir: Thurid og Elaina |
| 02/02 | **Kyndilsmessa í Harðaldssundi, byrjar kl 22.00** Fólk syrgja sjálvi fyri flutningi (sum í fjør). Vit gjalda við inngongdina, prísur seinni.<br>Brúsajøkil, Hans Poulsen. | |
| 09/02 | **Hugnakvøld**, kl. 19.00. Tekning – meir seinni.<br>Snekken hun ligger på landet, formaðurin. | |

Nýggjárskvøld og fastalávints mánakvøld er opið frá 20.30 til umleið á midnátt. Øll vaksin gjalda atgongumerki kr. 50,-.

**Barnadansur.** Foreldur í Gøtu hava barnadans í **Glyvr'Hanusarhúsi** í Norðragøtu mánakvøld kl. 19.00-20.00. Boð fáast á facebook: *Føroyskur dansur fyri børn*. Í **Hæddini** verður barnadansur kl. 19.00-20.00 **annaðhvørt** fríggjakvøld, sum vit eru í Hæddini. Verður lýst so hvørt. Kristian fer at taka sær av tí.

**Kunning** fáa limir okkara pr. e-post, (á eystdans.dk) og á Facebook: Eysturoyar dansifelag.

**Limagjaldið fyri 2023**, kr. 100,- verða limirnir bidnir at um at flyta í **Betri Banka 9181 575.616.4**
Viðmerking við gjald: navn/nøvn. Einki annað er neyðugt. (Tey, sum hava fasta flyting til um ársskiftið, hava longu goldið fyri 2023).

*Felagið er stovnað í 1969 og hevur til endamáls at savna fólk saman til góðan føroyskan dans og stimbra áhugan fyri dansinum. Limatalið er u. l. 120, og vanlig kvøld eru vit 25 til 40 fólk í dansi.*